# MASKINMEISTARASKÚLIN

*tín møguleiki - títt val*

## Maskinmeistaraútbúgvingin

***byrjar 5. august 2003***

Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta, hægri yrkisútbúgving, sum fáast kann í Føroyum, og gevur hon sera stórar møguleikar bæði á sjógvi og landi, umframt eisini í oljuvinnuni, har maskinmeistarar t.d. er størsti yrkisbólkur.

Útbúgvingin tekur 3 ár, men tað er eisini møguligt at gevast eftir próvtøku fyrsta árið, og gevur hesin eitt ára lestur ávís rættindi sum maskinistur

Hevur tú hug at gerast maskinmeistari, so kanst tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaðnum.



## Motorpassaraútbúgvingin

***byrjar 11. august 2003***

Motorpassaraútbúgving byrjar sum kvøldskúlaundirvísing í tíðarskeiðnum august-desember 2003 og januar-juni 2004.
Treytirnar fyri upptøku eru hesar:

- Hevur góðkenda handverksútbúgving, sum lýkur krøvini til upptøku á Maskinmeistaraskúlanum.

Undirvíst verður 2 kvøld um vikuna í eitt heilt ár.
Í fyrsta umfari eru mánakvøld og mikukvøld sett sum frálærukvøld. Pláss er fyri uml. 12-14 næmingum.

Eftir galdandi kunngerð hevur motorpassari rætt til at starvast umborð á skipum við framtøkumegi upp til 749 kW (1018 hk).

Hevur tú hug at gerast motorpassari, so kanst tú seta teg í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um lesturin saman við umsóknarblaðnum.

***Seinasta freist at søkja er 11. juni 2003***

**MASKINMEISTARASKÚLIN**
Undir Krákugjógv 5, FO-100 Tórshavn,
tlf. 312661, fax 318545
E-mail: mms@mec.fo, Heimasíða: www.mec.fo

Sosialurin 341800

# Hús í Vági til sølu

Hús á Oyralagi í Vági til sølu um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu ringja

**Tlf. 37 38 74**




TOR SHIPPING

# Til sølu

Vegna STRANDFARASKIP LANDSINS verður »TERNAN I« lýst til sølu, sum hon liggur á Vestmanna.

Møgulig boð skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. juni 2003.

STRANDFARASKIP LANDSINS tilskilar sær annars rætt til frítt at taka av ella havna innkomnum tilboðum.

Nærri upplýsingar um skipið kunnu fáast við at venda sær til:

**TOR SHIPPING**
Niels Finsensgøta 23
Box 1252
FO 110 Tórshavn
Tlf. 358531 · fax. 319369
e: mail: torship@post.olivant.fo · www.torship.com

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Læraraútbúgvingin

***Vilt tú vera lærari?***

Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

*LÆRARAÚTBÚGVINGIN*
*– ein útbúgving fyri lívið*

# Lærarastørv í Stranda skúla

Stranda skúli søkir eftir 2 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004.

Annað starvið er fulltíðarstarv fyri lærara í farloyvi. Hitt er 19 t/v vegna serligan tørv. Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi seinast 12. juni 2003 kl. 18.

Nærri upplýsingar fáast frá skúlastjóranum tlf. 447955 ella 218029.

**Skúlastýrið fyri Stranda skúla**
v/ Súna Kristiansen
480 Skála

**Í dag eru niðanfyri standandi partafeløg undir tvingsilsavtøku strikað úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. P/F 1056,
P/F Á Grundini,
100 Tórhshavn.

Skrásetingar-nr. Sp/f 2946,
Sp/f Aldan,
100 Tórshavn.

**Í dag eru niðanfyri standandi partafeløg undir trotabúarviðgerð strikað úr partafelags-skránni:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 854,
Sp/f Rudi Jensen,
100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** P/F 1065,
P/F Teldstar,
100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 1128,
Sp/f North Atlantic Invest,
600 Saltangará.
**Skrásetingar-nr**. Sp/f 2585,
Sp/f Atlantic Partners,
370 Miðvágur.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2728,
Sp/f Faroe Construction, 100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr**. Sp/f 2740,
Sp/f Kvilthamar,
700 Klaksvík.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2767,
Sp/f 1-7-98,
620 Runavík.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2842,
Sp/f Atlantic Radio,
100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2918,
Sp/f O. J. Rasmussen,
620 Runavík.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2987,
Sp/f Saga-con,
600 Saltangará.

**Í dag eru niðanfyri standandi feløg í likvidation strikaði úr partafelagskránni:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 938,
P/F Kølitek,
100 Tórshavn.
**Skrásetingar-nr.** P/F 2080,
P/F Frithleif og Martin Olsen,
620 Runavík.
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2193,
Sp/f Khiton,
640 Rituvík.
**Skrásetingar-nr.** P/F 2941,
P/F TF Holdings,
100 Tórshavn

*Skráseting Føroya, tann 26.05.2003.*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 588, P/F Guttesen & Staksberg, 100 Tórshavn.
**Rætting:**
Skráseting Føroya hevur av misgávum lýst kursin í samband við kapitallækking at vera 100. Rætti kursur er 218,53846

*Skráseting Føroya tann 2. juni 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3569
**Navn:** Sp/f Tóti
**Adressa:** 410 Kollafjørður.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 12.05.2003
**Viðtøkudato:** 12.05.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Bjarni Petersen, Líðin, 410 Kollafjørður.
**Stjórn:** Bjarni Petersen, Líðin, 410 Koallafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 12.05.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskivinnu og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 2. juni 2003*

*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 3350, Sparikassagrunnurin, 100 Tórshavn.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Súni í Hjøllum, 650 Toftir (næstformaður), Ansgar Thomas Jesper Olsen, 350 Vestmanna og Jonna Krog Poulsen, 210 Sandur.
Innkomin sum **næstformaður:** Tórmund Andrias Joensen, Millum Gilja 52, 188 Hoyvík.
**Innkomin í nevndina:** Frithleif Olsen, 640 Rituvík, Rólant Vidtfeld, 210 Sandur og Marian Jacobsen, 410 Kollafjørður.

*Skráseting Føroya tann 30. mai 2003*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 788, P/F Radiobúðin, 600 Saltangará.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Else Færø Joensen, 650 Toftir.
Innkomin í nevndina: Elvi Joensen, Garðavegur 8, 660 Søldarfjørður.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Eyðun Conradsson Joensen, 620 Runavík.
**Innkomin sum stjóri**: Trúgvi Joensen, Hjallavegur 18, 600 Saltangará.

*Skráseting Føroya tann 30. mai 2003*
*Kristin Balle*

---



# Starvsfólk til frystigoymsluna

**Vit sóknast eftir dugnaligum fólki til frystigoymslu okkara til at byrja skjótast gjørligt.**

**Starvið:**
- at standa fyri frystigoymslu okkara
- at skipa arbeiðið við avskiping, herundir bíleggjing av flutningi innanlendis/uttanlanda og avgreiða avskiping sambært avskipingarætlanum
- fyriskipa arbeiðið viðv. innfrysting og gera vøruna klára til avskipingar
- ábyrgd fyri lasting í bingjur og frystivognar
- harafturat áliggur starvinum eisini avgreiðslu/-avskiping av slógvi

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góðkent trukkloyvi
- at tú ert ágrýtin, nærlagd/ur og røkin
- at tú hevur skil á tølum
- at tú hevur góð samstarvsevni

Arbeiðið er støðugt og væntast kann at nakað av yvirtíð er. Løn og setanarviðurskifti eftir avtalu.

Skrivlig umsókn ynskist.

BAKKA FROST

Meira fæst at vita í telefon 447485 frá Martin Jakobsen, virkisleiðara.

P/F Alistøðin á Bakka og P/F Bakkafrost á Glyvrum ala laks og framleiða frystan, grýtukláran døgurðamat burtur úr laksinum. Vøran fer øll sum hon er til útflutnings. Árliga útflutningsvirðið er umleið 175 mió. kr. Umleið 120 fólk arbeiða í báðum fyritøkunum.

SISERO 351800

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Læknaskrivari

Á **Medisinska deplinum** er hálvtíðarstarv sum læknaskrivari leyst at søkja til setan 1. juli 2003 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, telefon 313540, lokal 232.
Umsóknarfreistin er 18. juni 2003 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

# Programmfólkastarv

## í Sjónvarpi Føroya

Eitt avloysarastarv sum programmfólk í Sjónvarpi Føroya frá 1. juli 2003 til 15. august 2004 er leyst at søkja.

**Uppgávur:** Í høvuðsheitum at arbeiða við tíðindaflutningi í Degi og viku og at gera aðrar aktuellar sendingar. Í minni mun kann eisini verða talan um at arbeiða innan onnur programmøki. Arbeiðið er skipað í vaktir við skiftandi arbeiðstíðum.

**Førleikakrøv:** Útbúgving og royndir sum tíðindafólk, ella aðra viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir. Vit vænta okkum harafturat, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur hollan kunnleika til føroysk samfelags-viðurskifti og til føroyskt mál.

**Løn og setanartreytir:** Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV verða at senda til Sjónvarp Føroya, postboks 21, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. juni kl. 16.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sjónvarp Føroya, tlf. 340400, og tala við Øssur Winthereig, tíðindaleiðara, ella Mikkjal Helmsdal, stjóra.

SISERO 351800

svf

Sjónvarp Føroya, M.A. Winthersgøta 2, 100 Tórshavn



# KVIK køkar

Vit lata aftur hósdagin 5. juni, men lata upp í nýggjum hølum primo juli

Tí verður ALT selt við stórum avsláttri

So sum: køkar, baðirúmstilhoyr, skjótihurðar

**kvik**
Heykavegur 1, 100 Tórshavn
Tel 31 24 80

# Eykaaðalfundur í MBF

mbf

Eykaaðalfundur verður í MBF húsinum týsdagin 17. juni kl. 16.30.

Skrá: Viðtøkubroytingar.

**Starvsnevndin**

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Námsliga útbúgvingin

***Vilt tú vera pedagogur?***

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501). Teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytirnar fyri upptøku á **námsligu útbúgvingina** eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið 9 ár í skúla hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

*NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN*
*– ein útbúgving fyri lívið*

Sosialurin 341800

# Feriuavloysari

Søkt verður eftir feriuavloysara at byrja beinanvegin.

Áhugað ringið tlf. 266437.

**Shellstøðin við Streymin**